gult cyan magenta svart



VIÐMERKINGAR

# Du har en fjende

**Lydia Arge**

Du har en fjende som er stærkere end alle hære i verden tilsammen, som har ødelagt flere mennesker end hele verdens krige, som har lagt flere hjem øde end de første kanoner og bomber, so finder sine ofre blandt unge, gamle, ulærde og skolede, som alle steder, på kontorer, værksteder, i kirkene, i mødesalene, på hotellerne, i hjemmene, på gaderne, ude på landet, som lurer i al hemmelighed og udfører meget arbejde i det stille, som ofte har været på besøg hos dig og uden tvivl kommer igen.

Navnet på din fjende er: LIGEGLÆDEN

Oversætter E. Cambell

Man kan sætte ligheds-tegn mellen ligeglæden og ansvarsløsheden. Men vi har alle et ansvar for hvad eller hvem vi vælger i en verden hvor opmærksomheden med korte mellemrum bliver rettet imod Israel. Et lille land på størrelse med Jylland, klemt inde imellem de store arabiske lande, der igen ønsker at udslette Guds hellige land og hans udvalgte folk - jøderne.

**Hitler eller Churchill - Arafat eller Sharon**

Vi ved at Hitler udryddede 6 mill. jøder i Holocaust, og at Hitlers mål var at skabe et »nyt Europa«. Efter at Chamberlain, ligesom Barak, troede på Hitlers »fredsløfter«, med sit »peace in our time«, lod Barak sig blænde af Yassir Arafats »fredsløfter« og »fred« straktater, som heller ikke har været mere værd, end det stykke papir, de er blevet skrevet på.

Men takket være en uvidende slægt fra 68'erne, kunne det lade sig gøre at vildlede offentligheden gennem massemedierne, som blev overbefolket med denne yngre og mere uerfarne generation. De fleste er ret historieløse, og p.g.a. vor forheksede og forjagede tidsalder, er det kun få, som giver sig tid til at læse biblens historie, både det nye og det gamle testemente.

Efter valget i Israel kaldes Ariel Sharon en »massemorder«, men historien melder intet om, at Yassir Arafat og hans terrororganisation PLO blev topuddannet i Sovjet. Derfra blev den velkendte internationale terrorisme sendt ud til hele verden. Eksemplerne har været mange og skræmmende. De burde tjene som advarsel for massemediernes journalister.

**Israels navn erstattet med navnet Palæstina**

Jesus profeterede i tiden, inden han blev korsfæstet, begravet og opstod igen, hvad der skulle ske med templet i Jerusalem og med Israel og jøderne. At de igen skulle sendes ud i landflygtighed, nu til alle jordens lande. Flere steder i det gamle testamente kan vi læse, at Gud igen ville samle sit udvalgte folk fra alle landene og sende dem tilbage til deres hellige land Israel. Alt dette er sket i vor tid. Hvis nogen derfor nægter Guds eksistens og almagt, er det tegn på, at sløvhedens ånd har lukket deres øjne, så de ikke kan se, og deres ører, så de ikke kan høre. »Dette folk dyrker mig med munden og ærer mig med læberne, men deres hjerte er langt borte fra mig, og deres gudsfrygt er tilrettelærte menneskebud.« Es. 29. 10-14. »De vises visdom skal ødelægges, og de kloges klogskab tilintetgøres«. v. 14.

Efter at Romerne havde udryddet mange jøder i Israel og taget mange til slaver og sendt dem til Rom, blev Israels navn slettet, og de såkaldte palæstinensere har aldrig ejet landet Palæstina som stat. De er arabere men kalder sig selv palæstinensere. Selve navnet er udledt af Filistæa, hvorfra filisterne stammer.

**1970 »Store September« udryddede Jordan 7000 palæstinensere**

Denne massakre hører vi intet om. Heller ikki at Syren har besat hele Libanon. Efter Jordan infiltrerede Yassir Arafat og hans terrorbande PLO, Libanon. Dette land blev tidligere kaldt for »Østens perle«.

Når man selv har været i det nordlige Galilæa i 1977 og 1979 og fulgt begivenhederne der tæt, virker det frustrerende at blive præsenteret for alle de disinformationer, der bliver sendt ud, nu også i de færøeske blade. Udelukkende p.g.a. en rystende uvidenhed.

1979 klagede man over FN's såkaldte »fredsbevarende« indsats i Libanon. Det viste sig at FN hjalp Yassir Arafat og PLO med at sende terroristerne igennem forsvarslinjen, så de kunne angribe det nordlige Israel. Det burde være kendt, at FN ejer mange af de arabiske lande som medlemmer, som alle er fjender af Israel.

1982 afslørede den israelske efterretningstjeneste, Mossad, en underjordisk fæstning ved Sidon, bygget af Sovjet sammen men Yassir Arafat og hans terrorbande. Denne fæstning indtog Ariel Sharon i løbet af 4 dage og afværgede dermed en 3. verdenskrig. Der var opstillet ramper til atomvåben, klar til at bruge, hvis ikke den israelske hær havde grebet ind i tide.

Libanon blev et hærget og ødelagt land med et udpint – fortvivlet folk. Mange af disse libanesere flygtede til Israel, da Barak trak Israels tropper ud af Sydlibanon, i rædsel for terrorbanden Hizbollah, som afløste Yassir Arafat og PLO.

Det vil tage for megen plads at opregne alle terrorbanderne, som Israels hær, der er kendt som verdens dygtigste hær, ustandselig må bekrige og bekæmpe.

Intet under at vor datter Hanna's svigermor Miriam sagde til mig, da jeg besøgte dem i Haifa: »Vi mangler en Churchill«. Hun vidste, hvad hun talte om. Hele hendes familie fra køln omkom i Holocaust, pånær Miriam og en ældre bror, der flygtede fra Hitlers terrorregime i 1934. Nu er der tale om en forvænt slægt, som kender lidet til »verdens larm«.

Israel optræder som politi ude i mellemøsten. Det er grunden til, at USA er afhængig af dette lille land og iøvrigt resten af den såkaldte »frie verden«.

Gid denne alvorlige sandhed må blive slået fast med syvtommersøm, således at alle kristne færinger fatter, at vi skal bede om fred for Jerusalem. Salme 122.6. Og vi skal trøste Guds folk. Es. 40.1.

# Nú stinga hógvarnir undan

**Heðin Mortensen,**
*tingmaður*
*Sambandsfloksins*



At nógv skitin vápn hava verið, og framvegis verða brúkt av teimum sum ætla at skipa Føroyar sum fullveldi, havi eg ongantíð verið í iva um. Men at eg sjálvur skuldi vera drigin uppí av ókendum fólki, hevði eg kortini ikki rokna við.

Mikudagin 21. februar fekk eg so prógv fyri, at vápnini ið nýtt vera, ongantíð eru ov skitin.

Tá stóð ein grein/lesarabræv í "Extra Bladet", við mínum navni undir. Greinin nevnist: "SÅDAN FÅR DANMARK OLIEMILLIARDERNE." Greinin er niðanfyri, so til ber at síggja tað sum skrivað varð.

Eg tók tað sum skemt, og eg meti tað framvegis vera skemt.

Men tá ivaleyst fleiri føroyingar, bæði í Føroyum og í Danmark hava lisið greinina, so kann eg ikki annað enn gera vart við, at eg ikki havi, og ongantíð hevði funnið uppá at skrivað nakað slíkt um ta avtalu sum landsstýrið og danska stjórnin í 1992 gjørdu um undirgrundina.

Avtalan varð gjørd eftir heimastýrislógini, og hon er í gildi, og kann ikki broytast. Tað hava fremstu føroysku og donsku juridisku serfrøðingar boðað frá. Og danska stjórnin sigur seg fara at virða avtaluna, og tað hevur størsti danski andstøðuflokkurin, Vinstra, eisini sagt.

Tað haldi eg meg til.

Hvørja fragd fólk finna í at skriva eina slíka grein uppá nakkan á mær, er ikki lætt at ímynda sær. Men eg eri sannførdur um, at tað verður gjørt, fyri at sáa enn meir split ímillum Føroyar og Danmark.

Eg havi leingi hugsað um, at fullveldisætlanin er ein samansvørjing ímillum nøkur fólk í landinum. Nakað hevur verið at sæð í bløðunum av og á, og skal eg ikki koma nærri inn á tað. Tað tykist sum fullveldisætlanin skal fremjast, uttan mun til úrslit og framtíðarvánir.

Eg vil ikki gerast ein partur í tí skitna spælinum, og tí vóni eg, at allir føroyingar fáa eyguni upp fyri tí sum fer fram, og vísa tí frá sær.

Tað er lítið hugaligt at verða hongdur út fyri nakað sum ein ikki hevur gjørt.

# Føroya Astma/Allergifelag

TÍÐINDASKRIV

Hvat er eitt limafelag uttan limir?
Hvat er ein nevnd verd uttan limir?

Hetta fekk nevndin í Føroya Astma/Allergifelag at síggja, tá aðalfundur var 10. febr. Bert nevndin saman við 4 limum og læknin, sum eisini í góðvild vildi leggja sína tíð av til at koma at greiða frá ovurviðkvæmi, vóru møtt. Ikki kann sigast annað enn at hetta kann ikki vera tann rætta tíðin hjá hesum felagnum at hava ársaðalfund, sjálvt um lógin sigur tað. Eru øll sjúk ella er ongin áhugi? Ella hvat er tað, sum er galið? Tí verður kallað til eykaaðalfund mánakvøldið 12. mars kl. 19.00 í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10c, Tórshavn, og ikki sum hevur verið at sæð í bløðunum, 5. mars. Ja, ein kundi bara hugsað sær at spurt hvat er galið, tá limafelag við 150 limum runt um í Føroya landi ikki kunnu møta til fundir. Fundir hava verið tíðliga á degi, soleiðis at fólk sleppa heim til húsa sama dag, men onki hjálpir. Lýst hevur verið til fundar á øðrum plássum enn bara í Havn, men ikki kann sigast at tað eru limir, sum møta. Tað er eftirhondini ikki sørt sárandi, tá ein nevnd í einum limafelag (óansæð hvat felagið eitur) kallar inn til fund og eingin hugur er at møta upp. Vit biðja lækna ella onnur koma at gera tað hugnaligt við at siga frá onkrum, sum vit øll skuldu havt gleði av at hoyrt. Sum teimum flestu kunnugt hevur Føroya Astma/Allergifelag sína egnu skrivstovu, sum er opin tveir dagar um vikuna, so hugnaligt hevði verið um vit hoyrdu frá hvørjum øðrum av og á. Um Føroya Astma/Allergifelag skal verða lív lagað vilja vit í nevndini heita á tykkum limir um at møta til eykaaðalfundin, sum verður 12. mars kl. 19.00 í MBF-húsinum. Nevndarval og lógarbroyting verður á skránni. Eisini er Jens Ole Hansen við og greiðir frá um ferðina til Ísrael (Arad), sum er kent fyri sítt sera astmavinarliga øki.

Møtið fjølment og sigið tykkara hugsan um hvat kann gearst? Eisini ber til at tekna seg sum lim.

**Nevndin**



VIÐMERKINGAR

# Eitt klípi til kjakið um góðan fjølmiðasið

**Jógvan við Keldu,**
*løgtingsmaður*



SAMSTUNDIS SUM TJÓÐVELDISVALEVNIÐ TIL BÝRÁÐIÐ Í TÓRSHAVN SLAPP AT LESA UPP Í ÚTVARPINUM, VARÐ FÓLKAFLOKSVALEVNIÐ TIL BÝRÁÐIÐ Í KLAKSVÍK SETT Í KARANTENU.

Nakað áðrenn seinasta býráðsval, vóru fólk hjá Klaksvíkar kommunu í samband við útvarpsmann, tí at ein barnaansingarstovnur skuldi lata upp. - Lat vera sagt, at júst tá var rættiliga nógv frammi um barnaansing og ansingartørv.

Tey nevndu síðani við meg, at útvarpið eisini vildi tosa við meg sum borgarstjóra.

Eftir boðum ringdi eg til útvarpsmannin og spurdi, um hann ætlaði at tosa við meg.

Svarið var rættiliga einfalt, "ja, men Jógvan tú ert í karantenu".

Síðani fór eitt vist kjak fram okkara millum. Eg spurdi, hvssu eg var í karantenu, tá eitt nú annað býráðsvalevni las bøkur upp í útvarpinnum. - Svarið frá útvarpsmanninum var bara okkurt hissini.

Nú málið um Sjónvarp Føroya, Hergeir Nielsen og exklusivu samrøðuna við Jóannes Ejdesgaard eftir tíðindalok er so nógv frammi, kundi henda útvarpssøgan verið heldur viðkomandi.

HVØR HELDUR BLAÐMANNAFELAGIÐ MUNURIN ER

Útvarpsmaðurin Gunnar Skúvadal vísti einum valevni, sum var borgarstjóri aftur at tosa um nakað so viðkomandi sum, at ein barnaansingarstovnur lat upp, tí valevnið var í karantenu.

Samstundis lesur tjóðveldisvalevnið Jógvan Arge uppstillaður til Tórshavnar býráð upp.

Fólkafloksmaðurin Jógvan við Keldu uppstillaður til Klaksvíkar býráð sleppir ikki í útvarpið, tí hann er í karantenu.

Hvør er munurin, hvat heldur blaðmannafelagið um eitt tílíkt dømi. – Er hetta ber tilvild.

Ja, lat okkum nú siga, at eg kærdi til programleiðara útvarpsins. Hvat hevði so hent.

Jú, programleiðarin eitur Jógvan Arge, valevni tjóðveldsfloksins til Tórshavnar Býráð.

Tað hevði borið til at kært til stjóran. Hvar stóð hann í einum tílíkum máli. – Kanska hevði hann sent málið til útvarpsnevndina, sum síðani hevði sent málið aftur til stjóran við bøn um viðmerkingar.

Helst hevði eg einaferð fingið eitt svar, men helst ikki fyrr enn eftir býráðsvalið.

HÓAST ÚTVARPSNINS ANDSTØÐU VANN EG TÓ

Fyri tíð síðani las eg frálíku bókina "Journalisten som aktivist". Har tekur hann millum annað til, at "henda núverandi "rasan" av tíðindafólkum fer at doyggja út".

Eg fari tó at enda við, at eg fekk ikki færri atkvøður av hesi løgnu hending, men hvør veit, um eg ikki stóð enntá sterkari, um eg sum fólkafloksvalevnið fekk somu viðferð, sum tjóðveldisvalevnið.

# Tekniski skúlin í Havn

**Heri Mohr**



Okkara fjølmiðlar (pressan) hava greitt frá, hvussu álvarslig fíggjarstøðan er hjá Tekniska skúla í Havn og at skúlanum vantar pening til umsiting av ognunum og til íløgur eftir krøvum frá Arbeiðseftirlitinum. At steingja skúlan er eisini komið uppá tal.

Hjá føroyingum yvirhøvur og hjá havnarfólki serstakliga, sum í hesum tíðum stara spyrjandi inn í myrkrið, har onki afturljóð fæst, er tað hóast hetta sjálvsagt at spyrja, hvussu fíggingin av nevnda skúla er tryggjað, og hví Føroya Løgting ikki játtar skúlanum tað, ið honum tørvar til rakstur og íløgur.

Til hetta er fyrst at siga, at skúlin er sjálvognarstovnur, sum verður fíggjaður við 80% úr ríkiskassanum og 20% frá heimakommununum, haðani næmingarnir koma.

Áðrenn 1. januar 1988 fekk skúlin tey 80%ini beinleiðis úr ríkiskassanum, men frá 1988 at rokna fóru hesi 80% við basis í útreiðslurnum í 1987 í blokkin. Av landskassans roknskapi 1988 framgongur, at »blokkupphæddin« til Tekniska skúla í Havn var 14.822 mió. og til skúlaheimið í Havn 3.002 mió. Hesar upphæddir vóru sostatt integrerandi partur av blokkinum, sum hetta árið varð settur til 480 mió. í løgtingsins fíggjarlóg.

Í 1999 var blokkurin frá 1988 hækkaður við 31% og á hesum støði ber til at rokna út, hvussu nógv nevndi skúli og nevnda heim áttu tillutað í blokkinum, og hvussu nógv løgtingið játtaði til sama endamál:

| | |
|---|---|
| Blokkurin 1999: | |
| Játtan 1988 | 14.822 mió. |
| Játtan 1988 | 3.002 mió. |
| | 17.824 mió. |
| + 31% | 5.525 mió. |
| | 23.349 mió. |
| Løgtingsjáttan 1999 | 14.630 mió. |
| Munur | 8.719 mió. |

Hvussu stórur munurin er í tíðini 1988/99, kann hvørt skúlabarn rokna út.

Um nakað er skeivt ella villleiðandi av tí, sum her skrivað, verður tað vónandi rættað frá kompetentari síðu. Sannførandi hevði tað verið, um ein møgulig rættleiðing hevði komið frá okkara landsstýrismanni í skúla- og mentunarmálum.

# Grundlógarnevndina kunningarferð til Talibanstýrið í Afghanistan

**- har byggja tey eisini á Abbasa farnu ideologi!**

**Regin Eikhólm**



Víðgongda loysingarrørslan í Føroyum hevur til tíðir skundað undir tíðarhóskandi broytingar í okkara samfelag, og tøkk fáið tey fyri tað, men hesi seinastu árini er tað mest nationalromantiskt afturhaldni, sum sermerkir rørsluna. Í ávísum førum eins stagnerað og talibanstýrið hvørs sannføring hvílir á Abbasa farnu ideologi.

Tað er sum um, at ert tú fødd/ur inni í nationalromantisktu rørsluna, nýtist tær als ikki at hava nakra sjálvstøðuga meining, tí tú arvar Abbasa og Babbasa. Ríkisfelagsskapurin, sum f…. hevur skapt, skal bert útnyttast og mergsúgvast, og tá hann er trároyndur verður farið undir at skuldseta, brigsla og ákæra sama fyri líkt og ólíkt. Um hetta er eitt genetiskt fyribrygdi (íløgulyndi) ella bert eitt umhvørvis treytað árin, kundu kanska blóroyndir hjálpt okkum við at funnið út av.

Tað tykist løgið og ørkymlandið at "frælsisgongd" føroyinga skal gróðursetast og mennast út frá útspilling av Danmark, sum hóast alt er og hevur verið tann mest gevandi partinum í ríkisfelagsskapinum bæði mentunarliga og fíggjarliga. Sjálvt okkara tvey binds móðurmálsorðabók frá 1998 hevur Carlbergfondet sum annan av høvuðsstuðlunum.

Nationalromantiski dreymurin um gamla "frælsa" stórbóndasamfelagið hoyrir til eina farna tíð! Nú er tað fólkið, sum er frælst og fer har sum tey trívast best. Ídnaðarsamfelagið gav teimum ognarleysu frælsi. Hetta persónliga frælsið var ikki fremjandi fyri smáu útoyggjasamfeløgini, har bílig arbeiðsmegi var ein treyt fyri raksturin av stóru bóndagørðunum v.m.

Persónligt frælsi byggir á fólksins vilja og ikki á hissini politisk lokabrøgd eins og núverandi framskundaða politiska loysingarprocessin ger.

**"Håbet fra Hoyvík"**

Skulu smáu útjaðarasamfeløgini klára at binda fólk til sín aftur, mugu tey hava útjaðarastuðul / blokkstuðul frá landinum, men sambært Landsstýrinum so avlagar stuðulin kappingarførið. Eftir er bert "mikrostats-teoriin" hjá loysingarministarinum, so hví ikki royna hana í praksis. Vit hava gott pláss á fleiri av okkara útoyggjum, og helst høvdu diciplarnir staðið í kø, fyri at sloppið at verið við til at realiserað hugsan meistarans.

"Det var så dejligt ude på landet" skrivar H.C. Andersen, sum sjálvur búði í høvuðsstaðnum, eins og stórur partur av okkara víðgongdu nationalromantisku ævintýrarum ger tað.

Í Nyrup hava vit møtt einum vinarliga sinnaðum altjóða statsmanni, hvørs javnlíka vit tíverri enn ikki eiga. At Nyrup stóð og stendur við sítt orð passar ikki til leistin hjá loysingarministaranum, sum annars hevði fyrireikað henda leistin í áravís. Hinvegin er støðufestið hjá løgmanni og varaløgmanni ikki ólíkt eini streymtalvu, har neyðugt er at kenna klokkutíma og dagfesting! Drotturin má vita hvønn leist teir høvdu brúkt, um teir møttu einum ikki vinarligum statsmanni, tá ein vinarligur kann gera slíkan háva?

Víðgongdi national-romantiski fullveldisdreymurin verður helst líka so frígerandi fyri persónliga frælsið í Føroyum, sum Talibanstýrið er fyri Afghanistan. Bæði byggja tey á romantiseraða einvegis ideologi har trúgvin og ikki realiteturin er avgerandi. Sambært donskum bløðum eitur føroyska vónin "Håbet fra Hoyvík".

Eins og hjá Talibanstýrinum skortar ikki uppá offurviljan hjá fullveldisætlanini tá vælferðin hjá Palliba og Marsannu skal ofrast, 20 til 25% niður í vælferð og færri útbúgvingarmøguleikar til tey fíggjarliga veiku í samfelagnum. Ríkisfelagsskapssømdirnar fella burtur og føroyingurin fær fremmanda status í Danmark.

Er hetta tað sum fólk ynskja, so átti grundlógarnevndin heldur at vitja Talibanstýrið í Afghanstan, og har fingið sjón fyri søgn, hvussu tað gongur tá Abbasa farna ideologi ókritiskt verður romantiserað og innførd.

Ynskja vit hinvegin at halda okkum til realitetirnar, so vil studiutúrurin til USA – um enn óneyðugur og dýrur – vísa, hvat ein vælrikin ríkisfelagsskapur kann menna seg til.